

ta leygardag. Her øll familjan umborð



*Lagið varð gott henda dagin, tá bátaárið varð sett í Vágsbotni.*

*Bátafestivalarnir á sumri kring um landið eru vorðnir sum smáar ólavsøkur við nógvum nýggjum samskfiti og sínamillum blíðskapi*



*Øssur Hjalt, Eyðun Joensen og Katrni Olsen, allir tríggir trúgvir bátaentusiastar*

sær egnan bát, eins og kommunur hava bygt bátahyljar víða hvar til sínar borgarar.

Havnin er frá náttúrunnar hond, um ikki longur brimpláss, so kortini ikki nøkur kyrruvág alla staðni, men ábøtur hava so munað nakað.

Tá nýhavnin út eftir Skansaboðunum í síni tíð var bygd, vóru vit mong, sum ristu við høvdinum um hesa dýru, og vísti tað seg, óbrúkiligu havn og bara at parkera byngjur á, men síðani hevur tað verið munandi kyrrari inni í havnarlagnum í mun til áður, tá sjálvt molin brotnaði ferð eftir ferð, og tað í landsynningsuppgangi fløddi niðan á Áarvegin og niðan í Tórsgøtu her í Vágsbotni.

Orðið kommuna merkir ítøkiliga sæð felags og eigur at vera eitt samhaldsfast felags samtak av borgarum, sum gjøgnum skattin dugnar flest øllum borgarum, ungum sum gomlum, høgum sum lágum best og mest møguligt.

Tí hevur barnaøkið umsíðir fingið sítt, eins og eldraøkið er ávegis bæta, um enn tað gongur ov seint.

Ítrótturin hevur langt síðani fingið sítt og fær framvegis, eins og ungdómurin fær.

Men vit eru kortini mong, sum í áravís hava sóknast eftir, nær skattafíggjaði komunali dugnin eisini røkkur okkum bátafólkum.

Gaman í hevur kommunan gjørt nakað og eisini sýnt bátafelagnum vælvild, sum kommunan eisini eigur tøkk uppiborna fyri, og sum eg fati kommunala hugburðin, hevur kommunan umsíðir eisini so smátt fingið eyguni upp fyri tí maritima siðaarvinum, tí maritima samleikanum og støðugt vaksandi áhuga millum borgarar fyri at reika við sjóvarmálan og ríka sítt lív tann vegin.

Kanska hevur kommunan bara lurtað væl eftir útvarpinum, sum farnu tveir mánarnar hevur varpað ljós á áhugan fyri tí maritima siðaarvinum.

Gløgt er gestsins eyga, og tí er tað bara gott og tiltrongt, tá kommunan seinru árini hevur fríðkað um fram við sjónum og reinskað vágirnar, og tað eg veit um, so vitja nógv ferðafólk hesar maritimu umhvørvisperlur, skoða tey ymsu førini, har eingi eru heilt eins og koma sær í vinarligt prát við okkum, sum fjasa við sjóvarmálan.

Tað er sum kunnugt trupult at spáa um framtíðina og m.a. ganda enn fleiri bátapláss fram inni í Havnini, men giti eg beint, so vænti eg í framtíðini enn fleiri borgarar saman við sínum fara at sýna áhuga fyri at eiga bát og ognast tað frælsi at kunna fara í bát at svala á sær og sínum, og tá ræður tað um sum kommuna at vera upp á forkant við gongdina.

Havnin hevur frá náttúrunnar hond sínar avmarkingar, men við avbjóðingum mennast fólk, eisini ein kommuna, og seti eg mína vón til at kommunan, og gjarna í samráð vid Bátafelagið, megnar at dugna eisini bátafólkunum millum sínar borgarar javnbjóðis øðrum borgarum, sum brúka skattafíggjað kommunal felags anlegg.

At enda vil eg egna vegna takka Bátafelagnum fyri álitið at røða her í dag, takka tykkum, sum tímdu at lurta og ynskja okkum øllum eitt gott summar við sigling, har vit framvegis eisini vara av hvørjum øðrum og passa væl upp á hvønn annan. Takk fyri.

**EyJo**



*Nógv fólk, kvinnur sum menn, ung sum gomul høvdu leitað sær í Vágsbotn, tá bátaárið fór av bakkastokki seinasta leygardag*

## Sosialurin og Rás2 og bátafólkið

Leygardagin 18. apríl varð bátaárið sett uttan fyri hølini hjá Bátafelagnum í Havn í Vágsbotni, haðani bátar og bátafólk úr øllum landinum vórðu komin at lýða á og hugna sær. Sosialurin og Rás2 vóru eisini tilsteðar. Vit fara í greinum og í sendingum at varpa ljós á serstøku og fólksligu bátamentanina og leggja fyri í dag við røðu Eyðun Joensen helt. Ì vinnurásini leygardagin frá klokkan 14 til 16 er samrøða við Kartna Olsen, og í morgunsendingini á Rás2 mánamorgunin fara vit eisini at hava samrøður við bátafólk og við borgarstjóran.